# Heiðraðir fyri bjarging av neyðstøddum manni á Norðhavinum

**22. mars 2004 bjargaðu kollfirðingarnir, Christian Christiansen og Jens Joensen, Hans Magnusi Hansen, sum hjálparleysur stóð uppi á stýrhúsrútinum á sokna báti sínum í ringum líkindum á Norðhavinum**

BJARGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað var eitt Guds undur, at Hans Magnus Hansen varð bjargaður á Norðhavinum hendan dagin. Eg trúgvi, at tað bara hevði snúð seg um minuttir, til hann ikki hevði orkað meira, sigur Christian Christiansen. Nú hevur hann saman við Jens Joensen fingið heiðurbræv og peningagávu fyri bjargingina*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Okkara størsta vónbrot hevði verið, um vit ikki megnaðu at bjarga Hans Magnusi Hansen. Tað var ikki lætt at fáa fatur á manninum. Vit gjørdu fyrst tvær miseydnaðar royndir. Tað var ikki, fyrr enn vit gjørdu triðju royndina, at vit fingu fatur á honum. Umstøðurnar vóru ringar. Veðrið var vánaligt við nógvari aldu og vrakið av bátinum, sum stóð steyrrættur í sjónum við gronini upp úr, gjørdi tað eisini trupult at sleppa fram at.

Soleiðis greiddu Christian Christiansen og Jens Joensen frá í Sosialinum eftir bjargingina av Hans Magnusi.

Christian og Jens vóru á veg aftur av útróðri á Norðhavinum, tá ið Jens helt seg síggja okkurt í sjónum. Hóast teir mistu tað, hann hevði sæð, burtur aftur, sigldu teir kortini tann vegin eina løtu. Tá ið teir komu fram, vísti tað seg at vera vrakið av einum soknum báti. Teir sóu ikki mannin beinanvegin, tí stevnið á bátinum vendi ímóti teimum. Ikki fyrr enn teir snaraðu um vrakið, sóu teir, at neyðstaddur maður stóð uppi á framrútinum og hevði vundið fanglínuna um armin – línuna, sum saman við Christiani og Jens gjørdist hansara bjarging.

### Virðisløn

Fyrst í hesum mánaðinum fingu teir báðir, Christian og Jens, virðisløn frá Carnegies Belønningsfond for Heltemod í Danmark fyri hesa bjarging.

Virðislønin saman við diplomi, sum er dagfest 5. desember 2005, er 10.000 krónur í part.

Christian Christiansen eigur 33 fót stóra útróðrarbátin, Elin C, og tá ið teir bjargaðu Hans Magnusi, høvdu hann og Jens Joensen róð út saman í umleið hálvt annað ár.

Í dag siglir Christian sum avloysari við skeljabátinum, Norðheim, og Jens arbeiðir hjá Fiskiveiðieftirlitinum.

Av tí, at Jens er staddur í Danmark í løtuni, og Christian fer avstað aftur í dag, eydnaðist okkum ikki at taka myndir av teimum báðum við diplomunum. Men vit hava so myndina, sum vit tóku stutt eftir bjargingina.

Í diplomunum stendur, at grunnurin hevur veitt teimum hendan heiður fyri bjarging av manni undan drukning.

Christian Christiansen sigur, at teir báðir fingu diplomini og virðislønina sendandi við postinum.

Spurdur, um teir áður hava verið úti fyri at bjarga nøkrum á sjónum, sigur Christian, at tað hevur hann ikki, men hinvegin hevur Jens áður verið við til at bjargað einum manni í Grønlandi.

- Hendan dagin, vit vóru á veg innaftur av Norðhavinum, og Jens helt seg síggja okkurt í sjónum, var eingin annar bátur so nær sum vit. Sá Jens ikki vrakið av bátinum júst í teirri løtu, hann sá tað, dugi eg ikki at síggja, at Magnus hevði komið livandi frá hendingini. Hann var rættiliga illa fyri og orkaði nóg illa at siga nakað, tá ið vit fingu fatur á honum.

Christian sigur, at ein annar bátur, sum eisini var á veg til lands hendan dagin, var norðrari á, men hevði neyvan sæð vrakið so lágt, sum tað fleyt í sjónum.

- Tað var eitt Guds undur, at Hans Magnus varð bjargaður. Eg trúgvi, at tað bara hevði snúð seg um minuttir, til hann ikki hevði orkað meira, sigur Christian.

### Steinpláta

Men tað er ikki bara Carnegies Belønningsfond for Heltemod, sum hevur heiðrað teir báðar kollfirðingarnar fyri bjargingina. Tað hevur Bjargingarfelagið í Kollafirði eisini gjørt.

- Fyri einum ári síðan vórðu vit bodnir til samkomu hjá Bjargingarfelagnum, sum handaði okkum hvør sína steinplátu. Hetta eru sera vakrar plátur, har eitt nú nøvnini á okkum og manninum, vit bjargaðu, eru graveraði.

Christian sigur, at tað fløvar, tá ið slíkur heiður verður sýndur, men tað, teir gjørdu á Norðhavinum hendan dagin, var tað, sum ein og hvør hevði gjørt í slíkari støðu.

- Okkara størsta vónbrot hevði verið, um vit ikki megnaðu at bjarga Hans Magnusi, tá ið vit sóu, hvussu vorðið var hjá honum. Vit eru ógvuliga fegnir um, at hetta spældi so væl av undir teimum ringu umstøðum, ið vóru, sigur Christian Christiansen.

# - Ivaðist ikki í, at hetta var mín seinasta løta

**- Eg sá onga sum helst vón um bjarging, men kortini vildi eg stríðast til tað seinasta. Meðan eg royndi at halda mær uppi á forrútinum, bleiv eg fleiri ferðir skolaður í havið, greiddi Hans Magnus Hansen frá**

NEYÐSTADDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Undir ringastu umstøðum, ið hugsast kunnu, slapp Hans Magnus úr oljuklæðunum og tungu trygdarskónum, meðan hann stóð uppi á forrútinum á frambygda bátinum, sum var sokkin og stóð upp og niður í sjónum.

- Sjógvur stóð um meg alla tíðina, og eg skolaði av fleiri ferðir. Luftin, sum sat í húsinum og helt gronini á bátinum uppi í vatnskorpuni og fanglínan, eg hevði fingið fatur á, vóru mín bjarging, til hjálpin púra óvæntað kom. Ongantíð áður havi eg verið so fegin um at síggja ein bát koma, sum hesaferð. Allir vøddar eru forstrektir, bæði í ørmum, bringu og beinum. Eg eri eymur um allan kroppin, og hálsurin er trekur, men sálarliga havi eg tað gott.

Soleiðis greiddi Hans Magnus Hansen frá eftir hendingina á Norðhavinum, 22. mars 2004.

Hann var á veg til lands í 29 fóts stóra útróðrarbáti sínum, Norðstjørnuni, tá ið hann fekk ein sjógv aftan tvørs, sum fylti bátin og tók hann niður við sær at kalla í einum. Báturin, sum var frambygdur, legði húsið í bakborðsíðu niður í sjógvin, fyltist við sjógvi og sakk eftir afturendanum. Inni í stýrhúsinum stóð Hans Magnus í oljuklæðum og tungum trygdarskóm, sum eru forstyrktir við jarni.



*- Eg havi ongantíð verið so glaður fyri at síggja ein bát koma ímóti mær, sum hendan dagin, tá ið øll vón var úti, segði Hans Magnus Hansen*
*Mynd: Maria Olsen*

- Her var eingin sum helst tíð til umhugsunar. Eg kavaði út úr húsinum, sum eg stóð og royndi at koma upp til vatnskorpuna. Báturin líkasum snaraði sær á og lá við fremra partinum av kjølinum uppi í vatnskorpuni. Eg var so heppin at fáa fatur á fanglínuni, sum var fest í framstavnin og fekk lest meg uppeftir. Lá línan í øvutum borði, hevði eg ikki fingið fatur á henni, men línan meir at kalla rak til mín. Báturin stóð nú at kalla steyrrættur upp og niður í sjónum og fleyt í vatnskorpuni av luftini, sum var inni í húsinum.

Undir ringast hugsandi umstøðum, bjargaði Hans Magnus sær uppá forrútin á bátinum, meðan hann alla tíðina helt í fanglínuna. Nógvur sjógvur stóð um hann, og viðhvørt var hann omaná vatnskorpuni og viðhvørt var hann undir

Tað var undir hesum umstøðum, at hann slapp úr oljuklæðunum og tungu trygdarskónum.

- Tíbetur hevði oljutroyggjan knappar, soleiðis at eg fekk hálað knapparnar upp og smoygt troyggjuna av mær. Eg sá onga sum helst vón um bjarging, men kortini vildi eg stríðast til tað seinasta. Meðan eg royndi at halda mær uppi á forrútinum, bleiv eg fleiri ferðir skolaður í havið. Eg stríddi meg uppá aftur. Alt gekk so skjótt fyri seg. Tankin, at fáa fatur á onkrum at bjarga mær á, streyfaði. Nógv fleyt rundan um meg í sjónum, og eg sá eitt nú ein tóman fiskakassa fara eftir sjónum. Eg avgjørdi tó at halda meg til fanglínuna og stríddist alt, eg orkaði, men kendi skjótt á mær, at orkan fór úr kropinum. Eg sá einki uttan um meg, og visti, at eingin vón var um bjarging. At hetta var mín seinasta løta, var eg ikki í iva um.

So vónleysar vóru umstøðurnar hjá Hans Magnusi, tá ið útróðrarbáturin, Elin C við monnunum, Christiani Christiansen og Jens Olsen, kom fram á hann.

- Eg havi ongantíð verið so glaður fyri at síggja ein bát koma ímóti mær, sum hendan dagin, tá ið øll vón var úti, segði Hans Magnus Hansen, tá ið Sosialurin tosaði við hann morgunin eftir hendingina.